TING-HELLAN

Samgonguflokkar:

# Traktatin fær onga ávirkan



## Hvørki Javnaðar- ella Sambandsflokkurin missa svøvnin av ES traktatini

ES TRAKTAT
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Tað nervar ikki teir báðir samgonguflokkarnar Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin nakað stórvegis, at danir í heyst møguliga fara at siga ja til ES traktatina ella eina stjórnarskipanarlóg.

Báðir flokkar eru nevniliga á einum máli um, at tað onga ávirkan fær fyri Føroyar, um danir siga ja.

– Tað er tað reina tvætl, at siga danir ja til ES traktatina, so fer tað at ávirka okkum, sigur Kristian Magnussen, formaður fyri tingbólkin hjá Javnaðarflokkinum.

– Tað fær onga beinleiðis ávirkan, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

Hvørgin teirra heldur tað vera neyðugt beinleiðis at fyrireika seg stórvegis til fólkaatkvøðuna.

### Fjas

Kristian Magnussen velur ikki tað blíðastu orðini, tá vit hitta hann uttan fyri tingsalin til eitt prát um ávirkanina av einari ES traktat í Føroyum.

Kristian Magnussen hava vit í øllum førum kunnað kallað ES skeptikara, men hann er vorðin munandi meira heitur fyri ES, síðani ES Traktatin kom upp á tungu.

– Nú verður ES gjørt til tað stóra dýrið - tann stóra syndaran. ES traktatin er í roynd og veru ein demokratisering av ES, sigur Kristian Magnussen.

Hann vísir á, at ES Traktatin ásetur nakrar greiðar avtalur um, hvussu ES skal skipast, og tað er stórur fyrimunur fyri ES.

– Áður hevur ES verið eitt stórt umsitingarveldi, men nú tykist vend at vera komin í, og serliga støðan hjá parlamentinum styrkist, sigur Kristian Magnussen.

Ein ES traktak vil bera við sær broytingar av ymsum slag, men hetta er einki at óttast og vil henda so hvørt, heldur Kristian Magnussen.

Heldur ikki avtøkan av eitt nú gjaldoyra fyrivarninum, sum vil bera við sær, at evran verður gjaldoyra í Danmark, nervar Kristian Magnussen.

– Føroyingar eru praktiskir. Tað hevur ongan týdning, hvat gjaldoyra er, so leingi tað hevur eitt virði, sigur Kristian Magnussen.

### Setir hol á kjakið

Kaj Leo Johannesen er sum sagt samdur við samgongufelagnum í, at tað ikki fær nakra stórvegis ávirkan á føroyska samfelagið. Ì øllum førum ikki her og nú.

– ES Traktatin vil savna træðrirnar innanhýsis í ES. Tað er meira ein formalisering av viðurskiftum, sum samstarva hevur verið um í nógv ár, sigur Kaj Leo Johannesen.

Formaðurin í Sambandsflokkinum heldur, at tað hetta væl kann gerast startskotið til, at føroyinga í størri mun fara at taka ES spurningin upp á tungu.

– Hetta fer vónandi at skunda undir kjakið í Føroyum. Tað er harðliga tørvur á, at vit skapa eitt kjak um ES í Føroyum, sigur Kaj Leo Johannesen.

Formaðurin í Sambandsflokkin leggur stóran dent á, at hetta prátið ikki skal setast í samband við spurningin um limaskap.

– Sambandsflokkurin ynskir ikki limaskap í ES her og nú. Tað kemur ikki upp á tal. Vit mugu tó tora at tosa um evnið, sigur Kaj Leo Johannesen.

---

Hergeir Nielsen, Tjóðveldisflokkurin:

# Syndarligur leikur

## Tjóðveldisflokkurin øtast um at skula sita uttanfyri og fylgja einum syndarligum leiki

ES TRAKTAK
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin er ikki glaður fyri uttanríkispolitiska spælið í løtuni. Eitt er eitt føroyska heimildarlógin tykist at hanga í leysari luft, men danir fara sum kunnugt eisini at atkvøða um ES traktatina í heyst. Og tað kann ávirka føroyingar almikið.

### Leggja seg ikki útí

Hergeir Nielsen er talsmaður fyri Tjóðveldisflokkin í uttanríkismálum. Hann sigur, at flokkurin



sum so ikki hevur nakað støðu til, um tað er ynskiligt at danir siga ja ella nei á fólkaatkvøðuni í heyst.

– Vit ætla okkum at fylgja væl við, og tað hevur stóran týdning, at vit í Føroyum fáa gott innlit, men vit leggja okkum ikki út í donsk viðurskifti, sigur Hergeir Nielsen.

Og tað hevur týdning, sambært Hergeir Nielsen, at føroyingar fylgja við frá byrjan av og vera kunnaðir um viðurskiftini.

– Tað er ikki vist, at tey fýra fyrivarnini verða tikin av, men tað verða tey kanska, og tað fær stóra ávirkan á okkum, sigur Hergeir Nielsen.

Tað hevur stóran prinsipiella týdning fyri Tjóðveldisflokkin at fáa sum mest vald í Føroyum, og ES traktatin kann gera tað torførari at fáa yvirtikið málsøki.

– Vit í Tjóðveldisflokkinum kunnu ikki liva við, at málsøki verða flutt til Brussel at umsitast, sigur Hergeir Nielsen.

### Fær stóra ávirkan

Tað er serliga ein felags uttanríkispolitikkur í ES, sum Hergeir Nielsen heldur koma tvørt fyri hjá føroyingum.

– Tá uttanríkispolitikkur verður fluttur til Brussel, so vita vit, hvat klokkan hevur sligið, sigur Hergeir Nielsen.

Men tað er ikki tað nógva Tjóðveldisflokkurin í andstøðu fær gjørt fyri at ávirka.

– Vit mugu viðganga, at vit standan uttanfyri og fylgja einum syndarligum leiki, sigur Hergeir Nielsen.

### Fullveldi er fortreytin

Tað er fatanin hjá Hergeir Nielsen, at samgongan gongur sær sjálvum ímóti við nýggju heimildarlógini. Ein heimildarlóg, sum Hergeir Nielsen á ongan hátt er glaður fyri.

– Nýggja heimildarlógin bindur okkum niður. Eg hugsi, at samgongan hevur rent seg fastan í hesum málinum, sigur Hergeir Nielsen.

Fyri Hergeir Nielsen og Tjóðveldisflokkin er tað grundleggjandi bert fullveldi ella ein yvirtøkuleistur, sum syrgja fyri at rætta upp á uttanríkisskútuna.

– Vit ætla okkum at hava eitt vakið eyga við gongdini, sigur Hergeir Nielsen.